# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgmansskrivstovan
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn
*Stílað Sjúrði Rasmussen, ráðgeva*

**Tórshavn, tann** 03. apríl 2006

**J.Nr.:** 0.02-200600199/12
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** TA/sed

**Tygara skriv:** 123-021/06-25

**Ummæli av ískoytisspurninginum frá landsstýrismálanevndini viðvíkjandi ellis- og røktarheiminum í Vági**

Almanna- og heilsumálaráðið verður við teldubrævi, dagfest 30. mars 2006, biðið um at ummæla ískoytisspurningar frá landsstýrismálanevndini viðvíkjandi ellis- og røktarheiminum í Vági.

Almanna- og heilsumálaráðið skal her ummæla tann partin av spurningunum, sum viðvíkja landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum.

*"Løgmaður verður biðin um at upplýsa, um nøkur umsókn er komin frá bygdunum í norðaru helvt í Suðuroynni um stuðul til ellis- og røktarheim, og í so føri um nevndin kann fáa avrit av umsóknini."*

Almanna- og heilsumálaráðið hevur 31. januar 2006 móttikið eina umsókn frá Tvøroyrar býráð, vísandi til løgtingslóg nr. 166 frá 22 desember 2005, *"um stuðul til bygging av 25 plássum til eldri, tað verði seg røkt-/dement ella sambýlislíknandi pláss"*.

./. Hjálagt er avrit av umsóknini.

*"Harumframt kundi nevndin eisini hugsa sær at vita, hvussu ætlanin er at avgreiða málið. Hvørt ætlanin er at broyta lógina um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli soleiðis, at hon gevur sunnaru og møguliga eisini norðaru helvt í Suðuroy sersømdir, og soleiðis at tað verður sett sum treyt fyri hesum sersømdum, at bygt verður á stykkinum vesturi við Vatnið í Vági, har sum Miðnámsskúlin skuldi verða?"*

Umsóknirnar til studningslán til ellis- og røktarheim verða í løtuni viðgjørdar í umsitingini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum. Tað ber tí ikki til at siga nakað enn, hvat niðurstøðan verður. Eitt tilmæli verður væntandi latið landsstýrismanninum fyri páskir. Viðvíkjandi spurninginum um ætlanin er at broyta løgtingslógina um studningslán til ellis- og røktarheim skal verða sagt frá, at ongin ætlan fyriliggur um at broyta hesa løgtingslóg.

*"Nevndin ynskir eisini at fáa upplýst, hvussu langt er komið við fyrireikingunum til eitt ellis- og røktarheim í Vági, um hetta heimið skal nøkta tørvin á búplássum í Suðuroy, í hvønn mun landsstýrið hevur verið uppi í hesum fyrireikingum, og hvat er goldið úr landskassanum í hesum sambandi."*

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálaráðið veit ikki annað enn tað, ið landsstýrismaðurin og embætisfólk hava fingið at vita, við luttøku á teimum fundunum, sum eru nevndir í hendingaryvirlitinum.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur einki goldið fyri nakað í hesum sambandi.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður

Aibritt á Plógv,
aðalstjóri

0.35 - 200600127

TVØROYRAR KOMMUNA

TVØROYRAR BÝRÁÐ
BÝRÁÐSSKRIVSTOVAN · telefon 3 71 085 · telefax 3 71 814 · postboks 80 · FO 800 Tvøroyri

Hin, 31. januar 2006

Almanna- og Heilsumálaráðið

Fax 35 40 45.

Att.:Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

Sagt verður við hesum frá, at býráðið á fundi í dag hevur samtykt niðanfyri standandi:

Við støði í tørvskanningini sum Almanna- og Heilsumálaráðið hevur gjørt og vísandi til løgtingslóg nr. 166 frá 22. december 2005, søkir Tvøroyrar býráð um stuðul til bygging av 25 plássum til eldri, tað verði seg røkt-/dement ella sambýlislíknandi pláss.

Vinarliga

borgarstjóri